## Kokain á pengaseðlum

Teir amerikonsku dollaraseðlarnir fáa ikki altíð ta bestu viðferðina og kunnu tí vera bæði rukkutir og skitnir, men nú vísir ein kanning, at 90 prosent av øllum seðlunum hava spor av rúsevninum kokain uppi á sær. Fyri tveimum árum síðani vísti ein tilsvarandi kanning, at tá vóru spor av kokaini á 67 prosentum av dollaraseðlunum, skrivar AP. Tey, sum hava gjørt ta nýggju kanningina, siga, at úrslitið prógvar, at kokain gerst alt meiri vanligt sum rúsevni í USA. Serliga illa stendur til í høvuðsstaðnum Washington. Har høvdu 95 prosent av teimum kannaðu dollaraseðlunum spor av kokaini á sær.



## Vestas undanvind

Danska vindmylluverksmiðjan Vestas er eftir øllum at døma ikki so meint rakt av altjóða búskaparkreppuni. Í hvussu er boðaði leiðslan í morgun frá, at hon væntar at røkka tí figgjarliga úrsliti, sum hon setti sær fyri fyrr í ár. Sostatt væntar leiðslan, at umsetningurin verður 54 milliardir krónur ella 20 prosent størri enn í 2008. Vestas hevur júst kunngjørt roknskapin fyri annan ársfjórðing, og vísti hann 442 milliónir krónur í avlopi fyri skatt. Tað er minni enn í fjør, tá sami ársfjórðingur hevði 675 milliónir krónur í avlopi. Fyrr í ár koyrdi Vestas næstan 1.300 starvsfólk til hús fyri at spara í rakstrinum.




*Johan Dahl, landsstýrismaður, Petur Joensen frá Jarðfeingi og Áki Johansen, sendiharri her saman við umboðum fyri Føroyanevndina í bretska parlamentinum*
*Mynd: Jan Müller*

# Einki pláss fyri kenslum í oljuvinnuni

**Hetlendingar og orknoyingar kunnu læra føroyingar ymiskt um oljuvinnuna, og hinvegin kunnu føroyingar læra grannarnar fyri sunnan mangt og hvat á fiskivinnuøkinum og innan almenna umsiting**

GRANNASAMSTARV
*Jan Müller/Árni Joensen*
*jan@ras2.fo*
*arni@sosialurin.fo*

Samskifti millum føroyingar, hetlendingar og orknoyingar kann koma øllum pørtum til góðar. Tað vóru allir partar samdir um, tá Jóhan Dahl, landsstýrismaður og umboð fyri Jarðfeingi hittu All Party-bólkin, sum er ein serligur bólkur í tí bretska Parlamentinum. Sum navnið sigur, er bólkurin mannaður við umboðum fyri allar flokkar og harafturat úr øllum landinum. Teir hava eittans felags áhugamál, og tað er Føroyar. Formaðurin í bólkinum, liberaldemokraturin Alistair Carmichael, er úr Orknoyggjunum, og hann er sannførdur um, at samskifti millum tey trý oyggjasamfeløgini kann gagna øllum pørtunum.

- Vit hava havt fundir við fleiri føroysk umboð, og eins og hinir var fundurin við Johan Dahl sera góður og gevandi, sigur Alistair Carmichael. Hann sigur, at fundurin gav teimum bretsku politikarunum betri kunnleika til Føroyar og hjálpti teimum at skilja føroysk viðurskifti og tær avbjóðingar, sum tað føroyska samfelagið stendur í.

Orknoyski tinglimurin sigur, at øll samfeløg hava sítt, men at tað eru altíð møguleikar at læra av hvør øðrum. Sjálvur leggur hann stóran dent á at fáa at vita, hvat orknoyingar og hetlendingar kunnu læra av føroyingum. Men hvat kunnu føroyingar læra av grannunum fyri sunnan?

### Oljuvinnan er pengavinna

- Vit hava 30 ára royndir innan olju- og gassvinnuna, og eg ivist ikki í, at vit kunnu læra føroyingar okkurt á tí økinum. Hinvegin kunnu føroyingar so læra okkum ymiskt um fiskivinnuna, eitt nú hvussu ein best umsitur vinnuna. So eftir mínum tykki hava allir partar møguleika at fáa okkurt gagnligt burtur úr hesum samskiftinum, sigur Alistair Carmichael.

Bretski tingmaðurin vil ikki siga, um føroyingar skulu taka oljuna og gassið upp á land í Føroyum, um nakað verður funnið, men hann letur ongan iva vera um, at føroyingar eru vælkomnir at spyrja seg fyri í Hetlandi um at fáa oljuna og gassið upp á land har. Men eini góð ráð hevur tingmaðurin úr Orknoyggjum at geva føroyingum:

- Oljuvinna er ein pengavinna burturav. Har er ikki pláss fyri tjóðskaparkenslum. Tí skulu føroyingar minnast til, at oljufeløgini hugsa bara um egin áhugamál og einki annað, sigur Alistair Carmichael við Rás2/Sosialin.

### Óheppin miðsavnan

Gongst sum ætlað koma umboð fyri All Party Group til Føroya í næstum at kunna seg um ymisk viðurskifti her. (Tey eru á vitjan í hesum døgum, red). Millum annað ætla umboðini at kanna, hvussu tann almenna umsitingin er skipað, og tey halda seg hava okkurt at læra av føroyingum á tí økinum.

- Í Bretlandi hava skiftandi stjórnir misavnað valdið í London og Edinburgh, og hetta hevur víst seg at vera stak óheppið fyri fjarskotin samfeløg sum Orknoyggjar og Hetland. Í so máta hava vit nakað at læra av føroyingum, hóast vit ikki kunnu samanbera viðurskiftini millum Føroyar og Danmark við okkara orsakað av tí stóra landafrøðiliga muninum, sigur Alistair Carmichael, sum verður við í tí bretska ferðalagnum til Føroya.